gult6 cyan6 magenta6 svart6

Vilja fegin fara undir havnabygging í Lopra

– Landsverkfrøðingurin hevði munnliga lovað okkum grót, emn tað grótið hevur hann síðani latið aðra kommunu fáa. Nú royna vit at fáa hann at halda lyftið, sigur Jacob Vestergaard, borgarstjóri

Áki Bertholdsen

Gongur sum ætlað, verður ein størri og betri havn bygt í Lopra.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumbiar Kommunu, sigur, at í løtuni hevur kommunan ongi stykki og ongar møguleikar annars at bjóða fólki, sum kanska kundi havt áhuga at farið undir okkurt virksemi í Kommununi.

Hann sigur, at kommunan hevur heldur ongar umsóknir um byggilendi til vinnuvirki.

– Fyrispurningar hava kortini verið og vit hava ábendingar um, at ávísur áhugi er fyri at leggja virksemi av onkrum slag í kommununi.

– Men so leingi ongir møguleikar eru, nyttar heldur onki at søkja. Tað, sum ræður um hjá okkum, er at skapar karmarnar, so at fortreytirnar fyri virksemi eru til staðar, um onkur skuldi havt áhuga. Vit noyðast at trúgva upp á framtíðina og okkara stóri trupulleiki er, at vit hava ov lítið atløgupláss, sigur borgarstjórin.

Lopra er í Sumbiar Kommunu. Og Lopransfjørður er samstundis einasta pláss í kommununi, har tað ber til at fera eina líkinda havn, tí Sumba er brimpláss burturav.

– Hartil kemur, at Lopransfjørður er sera vælegnaður til Havn. Tað er sera djúpt. Longu fyri endan á grótkastinum er dýpið 12 metrar.

Borgarstjórin sigur, at verður so farið út, framvið Akralandinum, skal heldur ikki nógv fyllast meiri enn einar 15 metrar út, so er dýpið 25 metrar, so tað skal ikki fyllast nógv út, so hava vit eina rættliga djúphavn í Lopra.

Landsverkfrøðingurin breyt lyftið

Ein orsøk til, at Sumbiar Kommuna sá ein gyltan møguleika at gera havn í Lopra nú, er, at alt grótið, sum varð sprongt úr Sumbiarbergholinum varð lagt í Lopransdal.

– Landsverkfrøðingurin hevur altíð havt tað siðvenju, at í sambandi við tunnilsgerðir eigur kommunan, sum arbeitt verður í, eisini grótið, sum er sprongt burtur.

– Í Lopransfjørði hevði ligið sera væl fyri at gjørt eina veruliga djúphavn og tað arbeiðir kommunan við. Trupulleikin er, at nú hevur Landsverkfrøðingurin latið Vágs Kommunu grótið, sum hann annars hevði lovað okkum, sigur Jacob Vestergaard, borgarstjóri

– Eitt nú er tað Bíggjar Kommuna, sum nú fær grótið, verður sprongt burtur úr ætlaða Gásadalsbergholinum, hóast aðrar kommunur kundu hugsað sær tað.

Jacob Vestergaard sigur, at munnliga hevði Landsverkfrøðingurin eisini lovað Sumbiar Kommunu grótið, sum liggur í Lopransdali.

– Men kortini er tað hent, at Landsverkfrøðingurin hevur lovað aðrari kommunu (Vágs Kommunu. blm.) grótið.

Sostatt hevur hann brotið gamla siðvenju og tað góðtaka vit ikki, serliga ikki, táið hann frammanundan hevur lovað okkum grótið, sigur borgarstjórin.

Hann sigur, at Kommunan fer tí at royna at fáa Landsverkfrøðingin at halda gamla siðvenju og tað lyftið, hann gav kommununi í síni tíð.

–Sjálvsagt eru aðrar kommunu vælkomnar at biðja Landsverkfrøðingin um grót, men eg haldi ikki, at tað er okkara borð. Og vit halda framvegis, at vit hava rætt til grótið í Lopransdali, bæði sambært siðvenju og sambært munnligari avtalu við Landsverkfrøðingin.

Røkja okkara áhugamál

Nú er stutt ímillum bygdirnar á Vágsfirði og skjótt er at koyra. Í Vági er stór Havn. Hvussu nógvar stórar havnir skulu vera á Vágsfirði?

–Hatta er ein góður spurningur, sum eg eisini ofta havi sett mær sjálvan. Høvdu kommunurnar verið lagdar saman, hevði alt verið so nógv einfaldari. Men tað eru tær ikki og vit í bygdaráðnum í Sumbiar Kommunu eru vald at røkja áhugamálini hjá Sumbiar Kommunu og at skapa neyðugu fortreytirnar hjá okkum sjálvum, ikki hjá øðrum kommunum. Og spyrt tú, hvar á Vágsfirði tað er skilabest at byggja havn, kann tað væl vera, at útslitið av teimum metingunum vóru til okkara fyrimun, sigur Jacob Vestergaard.

Sumba í ferð við at skola á bláman

–Brimið hevur máað so nógv burturav, av verður munadygg bakkaverja ikki gjørd, fara tey fyrstu húsini í havið um ein mansaldur

HÚS Í VANDA
Áki Bertholdsen

Hesi seinastu árini er so nógv máað burturav bakkanum í Sumba, at fleiri hús skjótt verða í vanda fyri at fara í havið.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumbiar Kommunu, sigur, at verður ikki okkurt munagott gjørt nú fyri at tryggjað bakkan, verða tað ikki nógv ár, áðrenn tey niðastu húsini eru farin á sjógv.

Sjálv arbeiðir kommunan við at tryggja bakkan og peningur verður settur av til endamálið á fíggjarætlanunum hjá kommununi.

Men kommunan er ikki fíggjarliga sterk og hon hevur tí søkt landskassan um stuðul til at tryggja bakkan. Enn er onki svar komið.

Kommunan hevur eisini søkt fyrr, men tá var umsóknin ikki gingin á møti. Men nú hevur Landsstýrið givið tilsøgn um at viðgerða málið einaferð afturat.

Borgarstjórin sigur, at upphæddin sum skal til fyri at tryggja bakkan, er lítil.

– Sjálv hevur kommunan sett 300.000 krónur av í ár. Høvdu vit fingið somu upphædd í stuðuli frá landskassanum, høvdu vit verið væl fyri, heldur hann.

– Fyri hesa upphæddina høvdu vit kunna arbeitt í einar tveir mánaðir um summarið og hevði arbeiðið kunna hildið fram soleiðis í eini fimm ár, høvdu sumbingar havt eina munadygga verja, allan vegin framvið bakkanum, sum ongan veg hevði farið.

Í Sumba er so nógv máað burturav Bakkanum, at tað ganga ikki so øgiliga nógv ár, so eru tey fyrstu húsini farin í havið. Mátingar vísa, at seinstu 40 árini eru 17 metrar mataðir av Bakkanum í støðum.Tí er tað alneyðugt at okkurt verður gjørt, sigur borgarstjórin

17 metrar farnir

Jacob Vestergaard sigur, at trupulleikin av, at ongin bakkaverja er, skal ikki undirmetast.

Mátingar vísa, at í støðum eru heilir 17 metrar máðaðir burturav bakkanum síðani Sumba varð matrikkulerað síðst í fimtiárinum.

–Táið so nógv kann verða máað burturav í bara 40 ár, er tað greitt, at tað ganga ikki meiri enn 40 áfturat, fyrrenn tey fyrstu húsini eru farin á sjógv, so langt niðan undir tey niðastu húsini er bakkin nú komin.

Borgarstjórin sigur, at tað er rættiliga ójavnt, hvussu nógv verður matað burtur um árið.

– Tað veldst alt um, hvussu árini eru. Síðst í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum vóru vetrarnir ringir við nógvum ódnum og nógvum brimi og tað fór heilt nógv í havið. Men hesi seinastu árini hevur tað ikki verið so ringt, tí nú hevur veðrið verið betri.

gult7 cyan7 magenta7 svart7

POLITIKKUR & SAMFELAG

Læraraskúlin er politisk gøla:

Rektarin er ósekur

Politiski myndugleikin hevur leingi vitað av, hvussu nógvan pening Læraraskúlanum tørvar í ár. Hetta prógva skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í. Tórbjørn Jacobsen segði ósatt um, at eingin fíggjarætlan var komin frá Læraraskúlanum, og Karsten Hansen sigur ósatt, tá hann sigur trupulleikan vera nýggjan fyri honum

LÆRARASKÚLIN
John Johannessen

»Tá fíggjarlógararbeiðið fór í gongd uppi í Mentamálastýrinum. Tá var Læraraskúlin einasti stovnurin undir Mentamálastýrinum, sum ikki lat nakra fíggjarætlan inn fyri 2001.«

Soleiðis segði fyrrverandi landsstýrismaðurin í mentamálum í Sjónvarpinum týsdagin 12. juni. Tórbjørn Jacobsen metti hetta vera orsøkina til, at Læraraskúlanum brádliga tørvar pening og ikki kann taka nakran læraraflokk inn í ár.

Tórbjørn Jacobsen segði, at hetta er eitt álvarsamt mál, og at rektarin fyri Læraraskúlan, Pauli Nielsen, hevur fingið eina ávaring.

Boð um meirjáttan

Men skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, sýna, at Pauli Nielsen er ósekur, og at ábyrgdin í staðin liggur hjá politiska myndugleikanum.

Pauli Nielsen hevur latið inn fíggjarætlan fyri 2001. Hon er latin inn tveir mánaðir ov seint; í september 2000. Men sambært rektaranum á Læraraskúlanum, er hetta í samráð við Mentamálastýrið. Sosialurin veit eisini, at fyrisitingin hevði mælt Tórbjørn Jacobsen til at hækka karmin við tí í huga, at Læraraskúlanum fór at tørva meira pening.

7. spetember í 2000 fær Mentamálastýrið fíggjarætlanina frá Læraraskúlanum. Skúlin sigur seg hava brúk fyri 675 túsund krónum meira fyri ár 2001 enn fyri árið frammanundan. Hetta orsakað av øktum lønarkarmi.



Orsøkin til, at Læraraskúlin ikki kann taka inn næmingar í ár er reint politiskt. Rektarin og embætisverkið hava fleiri ferðir í góðari tíð víst á tørvin á hægri játtan, meðan landsstýrismenninir hava vent deyva oyrað til. Nú geva politikararnir rektaranum skuldina

Mynd: Jens Kristian Vang

Skúgvað til viks

Fíggjarætlanin frá Læraraskúlanum var, sum embætisverkið í Mentamálastýrinum hevði roknað við. Tí skuldi ikki nógv gerast, áðrenn málið varð latið landsstýrismanninum, Tórbjørn Jacobsen.

Men Tórbjørn Jacobsen helt ikki, at Læraraskúlin skuldi fáa meira pening. Tí boðaði hann Fíggjarmálastýrinum frá, at Læraraskúlanum tørvaði somu upphædd sum í 2000.

Hetta gjørdi landsstýrismaðurin, hóast hann hevði fingið at vita frá sínum embætisverki, at skúlanum tørvaði í minsta lagi hálva millión meira enn í 2000.

Harafturat hevði landsstýrismaðurin longu á sumri í 2000 fingið at vita frá rektaranum á Læraraskúlanum, at neyðugt var við 600.000 krónum eyka til Læraraskúlan.

Í brævi dagfest 14. juli 2000 boðar Pauli Nielsen Mentamálastýrinum frá, at lønarkarmur skúlans ikki heldur fyri inniverandi ár. »Samanlagt snýr tað seg um 600.000,- kr., alt eftir hvussu umfatandi skeiðsvirksemið verður. Søkt verður ikki um hækkaða játtan. Sjálvt um játtanin er tepur, so vilja vit húsast innan fyri givna fíggjarkarmin fyri árið 2000«, skrivar Pauli Nielsen, rektari.

Hetta vil siga, at Mentamálastýrið longu í juli 2000 veit, at Læraraskúlin koyrir tungt. Men kortini vil landsstýrismaðurin ikki hækka játtanina, eins og Læraraskúlin biður um í fíggjarætlanini, og eins og fyrisiting hansara eftir øllum at døma hevur mælt honum til.

Karsten sveik

Óbroytta játtanin fyri 2001 ger, at embætisfólkini í Mentamálastýrinum longu í februar í ár fara at tosa um, at tað verður neyðugt við eykajáttan til Læraraskúlan. Eftir samskifti aftur og fram millum stýrið og skúlan koma embætisfólkini ásamt um, at rættast er at mæla landsstýrismanninum til at søkja um eykajáttan á hálva millión.

Hesaferð tók Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, undir við sínari fyrisiting, og mælti hann tí í skjali dagfest 12. februar 2001 Karsten Hansen, landsstýrismannií fíggjarmálum, til at seta hálva millión av til Læraraskúlan á fyrstu eykajáttanarlógi fyri 2001. Mentamálastýrið sigur soleiðis í grundgevingunum til Fíggjarmálastýrið:

»Í verandi skúlaári er á fyrsta sinni flokkur við fullum næmingatali á báðum útbúgvingunum á Føroya Læraraskúla. Skúlin fær ikki tikið flokk inn aftur í summar til báðar útbúgvingarnar, uttan hann fær eykajáttan. Biðið verður um eykajáttan, kr. 500.000,-, til at halda fram við neyðuga virseminum á Føroya Læraraskúla.«

Tórbjørn Jacobsen ásannaði sostatt, at játtanin rakk ikki til tað virksemið, sum var á skúlanum. Hann gjørdi hesaferð eftir bókini, og royndi eftir øllum at døma at bøta um tað mistak, hann hevði gjørt, tá hann strikaði hækkanina til Læraraskúlan í sambandi við fíggjarlógararbeiðið á heysti árið fyri.

Men landsstýrismaðurin, Karsten Hansen, sum er floksfelagið hjá landsstýrismanninum í mentamálum, vildi ikki leggja hesa játtan fyri tingið. Tá hansara uppskot kom fyri tingið, var eykajáttanin til Læraraskúlan strikað.

Heimildarloysi

Hetta merkir, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum við øllum upplýsingum á borðinum hevur sýtt fyri at útvega tann pening, ið er neyðugur fyri, at Læraraskúlin kann virka. Landsstýrismaðurin hevur sotatt tilvitað sett Læraraskúlan í ta støðu, at hann antin má spreingja sína játtan við at taka næmingar inn ella halda játtanina og lata vera við at taka næmingar inn.

Og tí kann spurnartekin setast við, um ikki landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur misrøkt sítt embæti.

Karsten Hansen hevur eisini sýtt fyri, at eitt útreiðsluneutralt fíggjarnevndarskjal, sum kann bjarga Læraraskúlanum, skal koma í fíggjarnevndina.

Avleiðingarnar eru í øllum førum, at fyrrverandi landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, í fyrsta lagi og Karsten Hansen í øðrum lagi hava borið so í bandi, at Læraraskúlin ikki kann taka næmingar inn í ár.

Og hóast rektarin hevur gjørt sína skyldu og kunnað Mentamálastýrið um støðuna í góðari tíð, er tað hann, sum alment av politiska myndugleikanum verður lagdur undir at misrøkja sítt arbeiði.

Skjølini, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, prógva, at bæði Tórbjørn Jacobsen og Karsten Hansen hava sagt ósatt í hesum máli. Tórbjørn hevur sagt ósatt um vantandi fíggjarætlanina, og Karsten Hansen hevur sagt ósatt, tá hann alment hevur sagt, at trupulleikin er nýggjur fyri honum.

NOKIA 3310
kr. 1.575,-
Postordrar verða avgreiddir
Tann nógv eftirspurda GSM telefonin til tey ungu er aftur á goymslu
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045